# Aftur ein jólagáva til EB/Streym

**VODAFONEDEILDIN** Seinast liðini møttust í Gundadali fekk EB/Streymur eina jólagávu frá B36, tá ein B36 leikari spældi Arnbjørn Hansen púra leysan, sum skoraði. Sigandi fyri dystin í Gundadali í gjár var, at Arnbjørn hesa ferð ikki tók av møguleikanum. B36 hevur nú ikki vunnið í landskappingini síðani 11. apríl, tá teir vunnu á Sandi.

Tróndur Arge

| | |
|---|---|
| B36 | 1 |
| EB/Streymur | 1 |

– Hatta er ein fantastiskur eginleiki hjá Arnbirni Hansen. Tá hann hevur runnið eftir hasum bóltinum tíggju ferðir, so rennur hann eisini ta ellintu ferðina og tað er ein fantastiskur eginleiki hjá einum áleypara at hava. Arnbjørn skal einki ringt orð hoyra frá mær fyri at hava brent handan møguleikan, sigur Heðin Askham um støðuna tá Arnbjørn fangaði »jólagávuna« frá Herberti í Lon.

EB/Streymur vann mánakvøldið í síðastu viku 3-0 á B68 og bjóðaði oddinum í landskappingini av. Í løtum í fyrra hálvleiki var spælið gott, men í seinnu hálvu av fyrra hálvleiki hendi at kalla einki.

– Einki riggar í fyrra hálvleiki. Vit fáa ikki uppspælið at koyra og B36 liggur sera kompakt í verjuni. Tí endar tað við longum sendingum frá til framherjarnir. Vit tosaðu í hálvleikinum um at vit máttu rættu uppá tað og eg haldi at vit spældu ein góðan seinna hálvleik, sigur Heðin Askham, venjari hjá EB/Streymi.

Seinni hálvleikur var smáar 10 minuttir gamal, tá B36 fekk hol á. Christian R. Mouritsen snýtti hegnisliga tveir sundalagsmenn í høgru síðu og legði bóltin innfyri til ein leysan Jákup á Borg, ið legði B36 á odda.

Eftir málið misti B36 tamarhaldið á dystinum og sundalagsmenn tóku yvir og skaptu fleiri góðar málmøguleikar. Millum annað tá Arnbjørn fangaði afturleggingina hjá Herberti í Lon, men Jóhan Pauli Jakobsen í B36 málinum stór bjargaði. Jóhan Pauli spældi ein góðan dyst í málinum hjá B36.

Tá so EB/Streymur fekk bóltin framvið Jóhan Paula, var tað fyrst eftir eina góðan bjarging, frá U21 landsliðsmálmanninum. Gudmund Nielsen var fyrstu á returinum og stútaði bóltin í mál. Løtu seinni fekk innskifti Dánjal Davidsen ein risa møguleika at avgera dystin. Leysur frammanfyri málinum stútar hann eitt innlegg á tvørstongina. Bólturin kemur út aftur og rakar Dánjal á beini og stíðani á stongina og út.

– Tað var ótrúliga erguligt at vit ikki fáa umsett onkrar av hasum møguleikinum til mál. Vit hava møguleikar at skora bæði eitt og tvey mál aftrat. Eitt stig á útivølli er ikki so gali, men eg haldi at vit kundu havt vunnið dystin. Vit ætla okkum upp í toppin sum skjótast aftur, sigur Heðin at enda.

At B36 manglar áleyparar sást tá teir skiftu miðverjan, Dmitrije Jankovic, inn sum fremsta mann. Dysturin var sum heild javnur, men EB/Streymur hevði yvirvág í størum mál møguleikum. Liðini møtast longu aftur 8. juni við Margáir, tá seinna hálvfinalan í steypakappingini verður leikt. Tann fyrra endaði við 2-1 sigri til B36.

*trondur@sosialurin.fo*




**AFTUR JAVNT**

*Róaldur Jacobsen og B36 spældu fyri fimtu ferð í ár javnleik, tá Gudmund Nielsen og EB/Streymur vitjaði í Gundadali*

*Mynd: Sofus Johannesen*

## Jákup á Borg:

# Klokku klárt reytt kort

Stutt fyri dystar enda í dystinum í Gundadali sunnudagin ímillum B36 og EB/Streym, mundu fleiri mans fari til hendurs. EB/Streyma leikarin, Hans Pauli Samuelsen hevur alboan ov høgt í einum luftdysti við Róald Jacobsen hjá B36. Róaldur liggur eftir á og B36 leikararnir vildu hava Hans Paula útvísan, men dómarin velur at geva Hans Paula gult kort.

– Tað er ongin ivi um at tað er eitt klokkuklárt reytt kort til Hans Paula. Hann er lítið av vøkstri og hann veit at hann ikki vinnur handan luft dystin, so hann plantar alboðan í andlitið á Róaldi. Um dómarin velur at geva kort har, so kann tað bara verða reytt kort. Um tað er við óvart, so er tað einki.

Jákup fekk í støðuni eftir frísparkið til Róald gult kort, helst fyri at hava sagt ov nógv.

– Onkuntíð hanga kenslurnar uttaná, tá vit spæla, men tá dysturin er liðugur er alt gloymt. Men eg haldi at tað er stórt fokus á, at ávísir leikarar ikki skulu sleppa at siga nakað. Tá dámar dómarunum ofta at seta seg sjálvar í fokus og geva kort lætt. Eg haldi framvegis ikki at nakar leikari hevur brotið seg sundur av mær. Eg brúki nógv munn og fyrst og fremst skal eg sjálvur læra meg at hava tamarhald á mær sjálvum, men dómarnir kunnu eisini lukka av fyri rópinum, sigur Jákup á Borg

**» Tað er stórt fokus á, at ávísir leikarar ikki skulu sleppa at siga nakað**

Jákup var eftir dystin ikki nøgdur við eitt stig.

– Tað er í »pottinum í Gundadali« at vit skulu hava stig og tað er frustrerandi ikki at fáa trý stig har. Í dag helt eg at vit høvdu gjørt nokk til at vinna, tá vit komu á odda. Eg kundi eitt nú økt til 2-0, men tað positiva er, at vit skapa møguleikar og eg helt at vit vóru omaná tað mesta av dystinum.

Fleiri vilja vera við, at B36 manglar ein áleypara. Tað er Jákup ikki ósamdur í.

– Tað er ongin loyna at vit mangla ein áleypara, sum kann berjast í brotssteiginum, men alíkavæl, so skora vit í hvørjum dysti. Vit vónaðu at við nógvum flytingum í álopinum, so kundu vit skapa ein spælistíl í trá við tað sum eitt nú Barcelona spælir, sigur Jákup at enda.

*trondur@sosialurin.fo*